

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 09 - 2012

# Týðandi kanningar eystan fyri føroyska markið

Hann tykist ongan enda at fáa áhugin fyri økjunum vestan og norðan fyri Hetland - eystan fyri føroyska markið! Nú oljufeløgini hava hugt í ein vestan í mong mong ár eru tey nú eisini av álvara farin at hyggja í ein norðan. Stóra økið norðan fyri Hetland og sum hevur mark til bæði Føroyar og Noreg tykist av álvara at fanga áhugan hjá seismikkvinnuni, ið er hon, sum aloftast slóðar fyri leitiboringum hjá oljufeløgunum. Norska seismikkfelagið TGS, sum eisini er ein kenningur um okkara leiðir, boðar nú frá, at tað er farið undir at skjóta tann mest framkomna 3D seismikkin í tveimum økjum norðan fyri Hetland, miðskeiðis millum føroyska og norska markið. Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at 3D verður skotið um hesar leiðir. Talan er um eitt øki uppá 1520 km2 í teigunum 208 og 217 á bretska landgrunninum. Tað er heldur ikki uttan orsøk, at TGS sjálvt hevur tikið stig til hesar tøkniligu framkomnu kanningarnar vegna fleiri kundar. TGS veit, at hetta eru øki, sum oljufeløgini fara at vísa stóran ans, tá bretska stjórin um ikki so langa tíð fer at kunngera, hvørji feløg fáa leitiloyvi á hesum leiðum. Tá fara úrslitini av kanningunum at fáa stóran týdning fyri víðari virksemi í økinum. Faroe Petroleum virkið Eisini fyri Føroyar hava hesar kanningar áhuga. Fyri tað fyrsta er reiðaríið Thor við í hesi verkætlanini við Thor Supporter, sum skal vera um stóra seismikkskipið Polar Dutchess. Harnæst hava allar seismiskar kanningar, sum verða gjørdar so nær Føroyum stóran áhuga fyri føroyskar myndugleikar og tey feløgini, sum eru her. Eisini er rætt at vísa til stóran áhugan hjá føroyska oljufelagnum Faroe Petroleum fyri júst hesum økjunum. Felagið hevur leitiloyvi í hesum umhvørvinum og gjørdi herfyri serstakar botnkanningar har. Nils Sørensen, stjóri í Faroe Petroleum segði við oljan.fo herfyri, at teir meta undirgrundina norðan fyri Hetland at kunna goyma stórar nøgdir av kolvetnum. Og felagið, sum er eitt av teimum mest virknu vestan fyri Hetland, ætlar sær ikki at

standa og hyggja at, meðan aðrir seta kós móti nýggju og spennandi oljuleiðunum har norðuri. Tað er tí øll orsøk til hjá føroyingum eisini at geva hesum kanningum og tí, sum fer at koma í kjalarvørrinum á teimum ans.